VIÐMERKINGAR

# Avgerandi er at álitið heldur

JENIS AV RANA
Løgtingsmaður fyri Miðflokkin



**Hóast oyðileggjandi borgarakríggið, sum hevur verið í Guatemala, so finna vit her Amalonga, eina oasu, eitt satt paradís. Ein uppfylling av lyfti Harrans um hvat hendir, tá fólk Hansara vendir sær til Hann, skrivar Jenis av Rana millum annað í lesarabrævi**

Í tí kjaki, sum seinastu tíðina hevur verið um lívsførslu, og um hvat samfelagið eigur ella ikki eigur at loyva, hevur verið ført fram, m.a. av løgmanni, at avgerðandi treyt fyri framgongd er tolsemi yvirfyri m.a. homosexuellum livihátti.

Nú eru ymiskar hugsanir um hvat framgongd er. Tað ein metir vera framgongd kann av øðrum verða mett mótsatt. Vit áttu tó at verið samd um, at broytingar, ið framdar verða persónliga eins væl og samfelagsliga, eiga at bera við sær eina trygd, ið ber og heldur, tá á stendur.

Samfelagsbroyting, ið gevur framgongd uppá lánta tíð, fyri síðani at sláa aftur sum ein boomerang við óhepnum og kanska skaðiligum fylgjum, er ikki verd at bera heitið framgongd, heldur mótsatt. Og sjálvur eri eg sannførdur um, at hugsanir løgmans, við fylgi, eru beinleiðis skaðiligar fyri samfelagið- og veruleikan hava tær einki samband við.

**Varandi broytingar**
Fá munnu tey samfeløg vera, sum so ríkiliga eru signaði av Skaparanum, sum føroyska. Runt land okkara eru menniskju, hvørs lív vórðu broytt, tann dagin tey møttu tí livandi Frelsaranum. Og gjøgnum hetta møti hjá tí eina broyttust familjur, bygdaløg, ja samfelagið alt.

Tær broytingar, ið komast av at møta og velja at fylgja Guði, eru broytingar, ið varða og sum ongar óhepnar seinfylgjur eru heftar attvørturímóti.

Loyvið mæt í stuttum at siga frá heilum býi, eitt dømi av fleiri, ið broyttist, tá íbúgvarnir valdu at fylgja Jesusi. Eg hevði forætt at vitja tey, og endurgevi stutt frá hesum undrunnar staði.

**Barrir stongdu og fangahús lótu aftur, tá Jesus kom á vitjan**
Býurin Amalonga liggur í Guatemalska háglandinum, og er forbýur til annan bý við 250000 búgvum. Tú kann ímynda tær Amalonga liggjandi úti í Havnardali, húsini spjadd um allan dalin, fjarstøðan eitt vet longri frá høvuðsbýnum enn frá Havnini. Har búðu fyri 15 árum síðani 6000 menniskju í ringastu armóð og fátækt, ið sigast kann frá. Býurin hevði 36 barrir, 4 fangahús, arbeiðsloysið var metstórt, spákaði tú runt, lógu full fólk, menn og kvinnur, sløð víða um og dagliga doyðu 2-3 smábørn av sjúku og hungri.

Eitt kvøldið kemur ein av hesum druknu monnunum slørandi gjøgnum býin, navn hansara er Mariano, er miðskeiðis í 30 árunum, dagligdagur hansara er merktur av drukk og óflýggjaskapi. Bráddliga hoyrir hann eina rødd, klára og týðuliga: "eg fari at nýta teg í verki mínum." Men eingin var har- Mariano gjørdist púra edrúur. Hann skilti, at tað var Gud, ið talaði. Mariano gjørdist ongantíð aftur hin sami, lívið broyttist 100%.

Eins íðin og Mariano hevði verið í tænastu deyðans, gjørdist hann í tænastu nýggja vins síns, Jesusar. Alla staðir, har hann kom, prædikaði hann óræddur evangeliið, og menniskju vórðu umbroytt.

**Handaverk frelsarans**
*Áðrenn Harrin vitjaði Amalonga jarðaðu tey dagliga 2-3 smábørn. Hesi doyðu av sjúku og/ ella hungri. Í dag er barnadeyði ókent fyribrygdi.*

*36 barreigarar góvu lív sítt yvir til Frelsaran, barrirnar vórðu stongdar, flestu teirra eru í dag handlar av ymiskum slagi. Tvær barrir eru, men bert vitjandi aðrastaðir frá koma á dyr.*

*4 fangahús vóru, einki teirra er í dag. Seinasta varð stongt í ´98, tað verður í dag m.a. nýtt til brúdleyp og onnur hátíðarhald*

*Meginparturin av løgreglumonnunum eru givnir, tørvur er ikki longur á teimum, teir 3, ið eftir eru, fáast við toll- og skattaavgreiðslui.*

*Fólkatalið er økt frá 6000 fyri 15 árum síðani til 24000 í dag.*

*Arbeiðsloysi er ókent fyribrygdi í dag, tvørturímóti streyma arbeiðsfólk til Amalonga aðrastaðir frá, man metir millum 2500-3000 dagliga.*

*Miðallivialdurin í Amolonga, sum fyri 15 árum síðani var 40 ár, er í dag útímóti tí vit kenna.*

*Hagtøl siga, at 92 % av íbúgvunum í dag eru endurfødd trúgvandi!*

**Og grøðin!**
*Amalonga er í dag kendur sum grønmetisgarður Ameriku. Hesin býur, sum áðrenn vekingin byrjaði ikki megnaði at breyðføða egnum íbúgvum, útflytir nú grønmeti til bæði mið- og norðuramerika, og tey droyma um at gerast grønmetisútflytarar til allan heimin.*

*Tað, tey framleiddu av grønmeti um mánaðin, framleiða tey eftir einum degi í dag. Og støddin á grønmetinum er ovurhonds og ókend aðrastaðir. Serfrøðingar vitja fyri at royna at finna orsøkina, vísindaliga niðurstøðan er, at eitthvørt evni finst í jørðini, sum teir, halt tær fast, hava valt at kalla manna.*

*Fimm ferðir skjótari er vøksturin har, enn aðrastaðir.*

**Á gøtunum í Amalonga**
Ein morgum í februar spákaðu vit gjøgnum gøturnar í Amalonga, marknaðardagur var. Har seldu tey grønmeti og frukt av øllum slag, gularøtur so stórar, sum tú bert droymir um, fyri at taka eitt dømi. Friðurin valdaði, tú sá ikki ein druknan, øll vóru vælkløddi. Úti á markunum arbeiddu vaksin og ung, børnini komu úr skúlanum, har var himmalskur friður.

Vit vitjaðu borgarstjóran, alt býráðið var møtt upp, ein stórfingin móttøka. Síggj fyri tær eina lítla býráðsskrivstovu, 9 guatemalskir politikarar og 20 norðurlendingar, saman sungu vit Honum prís, sum í kærleika Sínum ynskir at stýra dagliga degi okkara.

Hetta var av sonnum ein Himmalsk løta. Hon endaði við, at borgarstjórin leiddi í bøn og hann endaði á knøunum, lovprísandi Gudi.

**Ein stutt samanbering**
Guatemala varð herjað av borgarastríði í gott og væl 30 ár, friðarsemja varð gjørd í 1998. Borgarstríðið, saman við arbeiðsloysi og vána leiðslu, hevur skapað eitt samfelag í djúpastu kreppu. Jú mong eru rík, glæstriborgir tú sjáldan sær, fylla høvuðsstaðin, men í sama býi, og úti um landi, er neyðin so ovurhonds, at tað illa kann sigast frá. Sjúka og fátækt, ein miðallivialdur, sum í økjum neyvan røkkur 50 árunum- og dagliga doyggja tey av hungri og sjúkum, sum annars kunnu lekjast.

Men mitt, mitt í hesum finna vit Amalonga, eina oasu, eitt satt paradís, ein uppfylling av lyfti Harrans um hvat hendir, tá fólk Hansara vendir sær til Hann. Bert fimm minuttir eru at koyra til høvuðsbýin við sínum 300.000 íbúgvum, har ótryggleiki, neyð og avgudadýrkan enn heldur fólkinum í størstu fátækt.

Amalonga var kent fyri fátækt, rúsdrekkanýtslu, okkultismu og avgudadýrkan. Nú 15 ár seinni er Amalonga kent sum undrunnarbýurin. Tveir marknaðardagar eru um vikuna, hesar dagar keypa og selja tey grøði sína, og síðani verður fermt í stórar trailarar, sum bóndirnir sjálvir eiga. Hesir traillarar, ið eru eyðkendir fyri at vera prýddir við Bibliuorðum, koyra grøðina runt alt Amerika, bæði norður-, mið- og suður.

**Visión 2015 veruleiki í 2006?**
Vit fingu ein faldara frá Mariano, pastorinum. Í hesum faldara greiða tey frá undrunum í Amalonga. Tað vermdi hjarta mítt, tá eg í faldaranum las ørindi úr 2. Krýnikubók kap. 7 vers 14.- lyftið Guds til teirra, ið líta á Hann, einstaklingar, familjur og tjóð.

Gævi vit føroyingar gjørdu sum hesi fátæku, ørmu fólk í Amalongadalinum. Gævi vit treytaleyst vendu okkum til Harran, settu alt álit okkara á Hann, og lótu Hann stýra dagliga degi okkara frá tí minsta til tað største, heima, í skúla, í arbeiði, í býráði, á løgtingi og í landsstýri.

Tá gjørdist "visión 2015" veruleiki longu í 2006.

# Hvørji eru framtíðarútlitini í Miðeystri?

SVENNING AV LOFTI



Støðan í miðeystri er broytt nógv síðani Hamas vann palestinska valið. Nógvar metingar er gjørdar av støðuni, ið gjørdist øðrvísi enn mong høvdu væntað. Men veruleikin er so tann, at ein yvirgangsfelagsskapur situr nú við valdinum í Palestina. Betri kor og betri framtíð eg hevði ynskt neyðstadda palestinska fólkinum enn hana tey óivað fara fáa undir hesum nýggja stýrinum. Eisini hevði eg ynskt jagstraða ísraelska fólkinum ein betri granna enn Hamas. Men farna Fatah-stýrið var lítið mætari.

**Vónsvik – og alt í leysum lofti**
Støðan í miðeystri kann broytast frá degi til dags. Ikki einans Fatah-flokkurin hjá Abbas, men eisini ísraelska stjórnin og fólkið er vónsvikið av valúrslitinum. Sharon hevur ligið í vitloysi í fleiri vikur, men ikki er óhugsandi at hann – um ikki fyrr, so NÚ – hevði fingið heilabløðing av vónsviki, eftir at hava dragsað sínar egnu landsmenn eftir hárinum úr Gaza og givið palestinum ávakstarmikla økið, sum jødar við bit og slit høvdu dýrkað til ein "blómandi úrtagarð" men sum nú endaði í hondunum á sjálvum stýrinum hjá yvirgangsfelagskapinum Hamas.

Eftir at ferðast í Ísrael við ferðafólki mestsum á hvørjum ári seinastu 30 árini, merkir ein tann hjartaliga longsul, ið hetta fólk hevur eftir friði og góðum felagsskapi við grannar sínar, ein longsul, ið tey hildu Sharon kundi gera til veruleika. Men nú hann fekk hóttafall kenna hesi sum at alt hongur í leysum lofti.

**Tilvild – ella?**
Hví broyttist Ariel Sharon til eina "friðardúgvu"? So gott sum tað endamáli tykst hava verið, so meti eg sjálvur at í orsøkini til at Sharon stríddist so nógv fyri at koma til sættist við palestinar, sum hann gjørdi. Og júst henda ivasama orsøk kanska gjørdi, at alt nú er dottið á gólvið.

Ariel Sharon var fyri hørðumat finningum í sambandi við óbótagerðirnar í palestinsku flóttafólkalegunum Sabra og Shatila í Libanon í 1982, tá libanesiskir falangistahermenn, ið tóku lut saman við Ísraelska herinum undir innrásini í Libanon, drópu frá hond. Hóast eingin ísraelskur hermaður var við í hesi illgerð, so vildu summi geva Ariel Sharon skuldina fyri hetta, tí hann hevði ábyrgdina av innrásini. Ísraelsmenn høvdu als onga an lut høvdu í hesum, men gjørdu tað stóra mistak at lata falangistarnar fara inn í flóttalegurnar at leita eftir Hisbolla-yvirgangsfólki. Hetta áttu ísraelsmenn sjálvir at havt gjørt!

Ariel Sharon var fyri miklum ákoyringum fyri hetta mistak. Ja, menn vildu hava hann fyri mannarættindardómstólin í Haag.

Men hvør var so orsøkin til, at sterki generalurin og stálsetti høgrapolitikkarin Ariel Sharon umbroytist til at gerast ein "friðardúgva", sum fór longri í "land fyri friði"-politikkinum enn teir á vinstravonginum nakrantíð droymdu um at fara?

Mín meting er, at Ariel Sharon – komin væl til árini – gjørdi sær sjálvum greitt, at hann vildi ikki at fólk skuldu minnast hann í sambandi við Sabra og Shatila, og at hann tí vildi mana burtur hetta "spøkilsi", so at hann kundi enda lív sítt og eiga umdømi sum ein friðarmaður, .

Hann royndi, men sigast má, at henda roynd Ariel Sharons, eydnaðist ikki til fulnar. Tann stóri spurningurin er hví? Er tað ein andalig og bíbilsk frágreiðing til hetta?

Ella er tað tilvild?

Sjálvur trúgvi eg ikki upp á at tilvildin ræður tá tað snýr seg um Ísrael og framtíð tess! Tvørturímóti!